From: Gilli Wardum
To: Fíggjarmálaráðið
Subject: RE: Til ummælis
Date: 9. februar 2026 18:59:25
Attachments: image003.png
image004.png
image005.png

Til Fíggjarmálaráðið

Eins og víst verður á í viðmerkingunum til lógaruppskotið um at seta úr gildi ymsar eldri lógir viðvíkjandi almennum hagtølum, virkar Hagstova Føroya sambært løgtingslóg frá 1991 um Hagstovu Føroya. Sambært hesi lóg hevur stovnurin uppgávuna at savna, viðgera og almannakunngera hagtøl um samfelagsviðurskifti, og somuleiðis heimild at krevja tær upplýsingar, ið mettar verða neyðugar til hagfrøðiligar uppgerðir.

Við hesum í huga eru eldri lógir og kunngerðir, sum eru settar í gildi áðrenn løgtingslógina um Hagstovu Føroya frá 1991, ikki longur neyðugar fyri virkisførið hjá Hagstovu Føroya. Hagstova Føroya hevur tí ongar viðmerkingar til, at hesar lógir verða settar úr gildi.

Løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011 var ein tíðaravmarkað lógarheimild til at fremja eina fólkateljing undir Hagstovu Føroyum. Hon hevur sostatt ongan týdning í dag.

Vh Gilli

Gilli Wardum
Stjóri
Hagstova Føroya

Beinl.: 352850
Telefon: 352800
Heimasíða: www.hagstova.fo